UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **8. juni 2022**
Tygara ref**.:**
Máltal**.: 21/08502-124**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-202/2021 frá Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingskvinnu, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

Hví er spakin ikki settur í enn til nýggja Húsarhaldsskúla Føroya ?

Svar

Orsøkin til, at spakin ikki er settur í til nýggja Húsarhaldsskúla Føroya, er, at Uttanríkis- og mentamálaráðið ikki hevur givið skúlanum tilsøgn um stuðul til byggingina.

Ein høvuðsorsøk til, at tilsøgnin ikki er givin, er, at verkætlanin, eftir at tilboðini eru komin inn, er dýrari enn mett, og sum lagt er upp til í galdandi heimildarlóg um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík, har landsstýrismaðurin hevur fingið heimild at veita 21 mió. kr. í stuðli. Henda upphædd vísir seg nú at vera ov lítil, og neyðugt verður tí at broyta galdandi heimildarlóg, um verkætlanin skal fremjast fyri nýggja kostnaðin.

Umframt endaliga byggikostnaðin eru eisini onnur ivamál, sum Uttanríkis- og mentamálaráðið vil hava fult greiði á, áðrenn nøkur tilsøgn um stuðul til bygging verður givin. Samskift verður við skúlan um kostnaðin og hini viðurskiftini, sum ivi er um.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður